# Oljupengar koma væl við hjá Náttúruvísindadeild

GRANSKING OG OLJUPENGAR
*Jan Müller*

Í dag fer Jóannes Djurhuus at verja Ph.D. ritgerð sína í kolvetnisrelateraðari jarðalisfrøði *Analytical investigation of in-situ stresses and hydraulic induced borehole fracture.* Í ritgerðini hevur Jóannes ment algildugar støddfrøðisligar fyrimyndir ("modell") av spenninum í gróti kring borihol. Verjan fer fram á Læraraskúlin í dag klokkan 13. Hetta er tann fyrsta doktararitgerðin frá Náttúruvísindadeildini. Hon er fíggjað av oljufeløgunum í tí gamla AMG bólkinum, har bert Statoil er eftir í Føroyum. Hini feløgini vóru Mobil og Enterprise.

Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini vísir á, at grundarlagið undir tí, sum nú fer fram á hesum økinum, eru teir pengar, sum vórðu latnir í 1998 av AMG-bólkinum. Ph.D verkætlanin er ein partur av tí sponsoravtaluni. Hin parturin er sponsoreringin av partíar profesorati.

Hans Pauli Joensen er sera fegin um, at tað hevur eydnast at fáa oljufeløg sum Statoil at vísa granskingini og arbeiðinum hjá Náttúruvísindadeildini ans. – Tað at oljufeløg komu inn í myndina í 98 var sera heppið, tí júst tá umhugsaðu vit at vera við til at byggja upp eina kompetansu í Føroyum á hægri støði við atliti at oljuvinnuni. Vit valdu at fara inn rímuliga tíðliga, men tá vóru eingir pengar á fíggjarlógini til slíkt. So man kann siga, at vóru teir pengarnir frá oljufeløgunum ikki komnir, so høvdu vit ikki byrjað so tíðliga og vóru heldur ikki komnir so langt ávegis.

Hans Pauli Joensen vísir á, at tey í løtuni hava tvær PhD verkætlanir í gongd umframt ein postdoc. verkætlan. Tey eru eisini farin at byggja upp eina rannsóknarstovu á Náttúruvísindadeildini. Teir fyrstu oljuverkfrøðingarnir eru eisini klæktir á deildini, og har var seinasta hálva annað árið fíggjað við sponsorpengum frá Statoilbólkinum m.a. uppihald hjá studentum í Norra og Danmark.

- So oljufeløgini hava havt ein sera týðandi leiklut fyri menningina av hesum fakøkjunum á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Her er talan um geofysikk ella jarðalisfrøði við atliti at kolvetnisvinnuni. Men hinvegin hava vit alla tíðina lagt dent á, at projektini skulu hava týdning og vera áhugaverd sjálvt um eingin oljuvinna verður. So tað er lagt upp soleiðis, at projektini hava ein breiðan vísindaligan áhugan. Verður eingin olja funnin, so hevur hetta kortini ikki verið til fánýtis. Vit hyggja eitt sindur breiðari men kortini hava vit oljuvinkulin í kikaranum sigur leiðarin á Náttúruvísindadeildini.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg

## VIÐMERKINGAR

# Teir skriftærdu, prestarnir og Jesus

**Ebbedinna Jacobsen**
*Kollafirði*



Ikki so sjáldan lesa vit bæði í føroyskum og donskum bløðum um, at menn og kvinnur, ið hava lisið gudfrøði og virka sum prestar, avnokta at Jesus Kristus varð føddur av eini moyggj.

Hesir stíga fram og siga, at Bíblian ikki í øllum førum er innblást av Gudi.

Teir loyva sær at skræða Guds orð sundur fyri eygunum á teimum, sum tey skulu vera andaligir vegleiðarar hjá. Jesus segði um slíkar:

"Blindir vegleiðarar eru teir blindum; og tá ið blindur leiðir blindan falla báðir í grøvina." (Matteus 15,14)

Táið vit lesa í evangeliunum síggja vit, at tað eru høvuðsprestar og skriftlærdir, sum Jesus ofta talar um og biður okkum varða okkum fyri. Jesus visti alt og kendi hugsanir teirra, so tað var ikki av ongum hann segði so.

Eg haldi at ávarðing Jesusar móti slíkum er eisini í gildi í dag.

Tað vóru eisini hesir somu, sum við svikum, fingu Jesus tiknan av døgum.

Teir skipaðu eisini fyri, at væl skuldi verða hildið vakt við grøv Jesusar, av ótta fyri at lærisveinar Jesusar fóru at stjala líkið og siga hann vera risnan upp. Men teir kundu ikki við allari teirra vakt forða fyri at Jesus reis upp. Tá ið so Jesus var risin upp góvu teir fólki pening fyri at bera fram ósannindi og søgdu:

"Lærisveinar Hansara komu um náttina og stjólu Hann, meðan vit svóvu.".

Alla hesa tilgongdina lesa vit um í kapitlunum 27-28 í Matteusar evangelium.

**Ormaavkom**

Í Nýggja Testamenti verður nógv skrivað um hvussu omanfyri nevndu persónar bóru seg at móti Jesusi, sum var hin í Skriftini fráboðaði Messias. Her skulu verða tikin nøkur dømi:

Jóhannes doypari sigur:

"Men tá ið Jesus sá nógvar Farisearar og Saddukearar kom til dóp sín, segði hann við teir: "Ormaavkom! Hvør lærdi tykkum at flýggja undan vreiðini, ið kemur?" (Matteus 3,7)

"Tá ið Farisearnir hoyrdu hetta, søgdu teir: "Tað er bert við Be´elsebul, høvdinga hinna illu anda, Hesin (Jesus) rekur út illar andar." (Matteus 12,34)

Í kapitlunum 23-24 í Matteusar evangelium eru nøkur álvarslig orð viðvíkjandi omanfyri nevndu persónum, t.d.:

"Vei tykkum, tit skriftlærdu og Farisearar, hyklarar tykkara!" 23,14

"Vei tykkum, blindu vegleiðarar tykkara!" 23,16

"Høggormar! Ormaavkom!" 23,33

"Mangir lygiprofetar, skulu stíga fram og villeiða mong." 24,11

"Høvuðsprestarnir og alt ráðið royndu tá at fáa rangan vitnisburð móti Jesusi, so teir kundu taka Hann av døgum." 26,59

"Tá ið nú morgunin var komin, hildu allir høvuðsprestarnir og hinir elstu fólksins ráð móti Jesusi at drepa Hann." 27,1

"Og alt tað, sum høvuðsprestarnir og hinir elstu klagaðu Hann fyri, svaraði hann einki." 27,12

"Men høvuðsprestarnir og hinir elstu yvirtalaðu fólkið at biðja um at fáa Barrabas leysan, men Jesus dripnan."27,20

"Á sama hátt háðaðu høvuðsprestarnir Jesus." 27,40

"Dagin eftir? savnaðust høvuðsprestarnir og Fariseararnir hjá Pilatusi og søgdu: "Okkum kemur í hug, at hasin villeiðarin (Jesus) segði, meðan hann enn livdi: Eftir tríggjar dagar rísi Eg upp." 27,62

**Teir østu fólki upp móti Jesusi**

Í Markusar evangelium lesa vit:

"Táið hinir skriftlærdu og fariseararnir sóu, at Hann át við tollarum og syndarum, søgdu teir við lærisveinar Hansara: "Hann etur og drekkur við tollarum og syndarum." 2,16

"Varðið tykkum fyri hinum skriftlærdu, sum fegin vilja ganga í síðum klæðum og verða heilsaðir á torgunum." 12,38

"Høvuðsprestarnir og hinir skriftlærdu royndu, hvussu teir kundu taka Jesus við svikum og drepa Hann." 14,1

"Men høvuðsprestarnir østu fólkið upp at biðja um, at hann fyrr skuldi geva teimum Barrabas leysan." 15,11

**Royndu at fáa Jesus fyribeindan**

Í Lukasar evangelium lesa vit:

"Hinir skriftlærdu og Fariserarnir høvdu eyguni eftir Jesusi, um Hann mundi fara at grøða sabbat, fyri at teir kundu finna okkurt at klaga hann fyri." 6,7

"Menniskjasonurin skal líða nógv og verða vrakaður av hinum elstu, høvuðsprestunum og hinum skriftlærdu." 9,22

"Bæði Fariseararnir og hinir skriftlærdu knarraðu og søgdu: "Hesin (Jesus) tekur ímóti syndarum og etur við teimum!" 15,2

"Men høvuðsprestarnir, hinir skriftlærdu og hinir fremstu menn fólksins royndu at fáa Hann ruddaðan av vegnum." 19,47

Í Jóhannesar evangelium lesa vit:

"Høvuðsprestarnir og Fariseararnir sendu tænarar avstað at taka Jesus." 7,32

"Høvuðsprestarnir løgdu upp ráð at drepa Lázarus við." 12,10

**Rannsakaðu og prædikaðu skriftirnar, men vóru ikki umvendir**

Í Apostlasøguni 26,11-12 sigur Paulus, sum áðrenn umvending sína var ein skriftlærdur fariseari, um leiklut sín í at jagstra tey trúgvandi:

"Eg læt tey íðiliga straffa í hvørji synagogu og tvingaði tey at spotta, og eg gekk so langt í øði míni móti teimum, at eg forfylgdi tey til býir í øðrum londum. Í hesum ørindum fór eg tá til Damaskus við valdi og myndugleika frá høvuðsprestunum."

Hóast hann var ein skriftlærdur og kendi skriftirnar, var hann kortini ikki ein umvendur maður. Hann helt seg vera á góðari andaligari leið, men nýggja lívið í Kristusi var hon fremmant. Hann var ein av teimum, sum Jesus segði um:

"Tit rannsaka skriftirnar, tí tit hugsa, at tit hava ævigt lív í teimum; og tað eru tær, ið tala um Meg. Og til Mín vilja tit ikki koma, so tit kunnu fáa lív." (Jóhannes 5,39)

Vitnisburðurin hjá hinum skriftlærda Paulusi, er hesin:

"Eg, sum áður var spottari, atsøkjari og yvirgangskroppur, men eg fann miskunn, av tí at eg visti ikki betur, tá ið eg í vantrúg gjørdi so? tað er trúvert orð og til fulnar vert at verða fagnað, at Kristus Jesus kom í heimin at frelsa syndarar, og av teimum eri eg hin størsti."

# Nú er nokk!

**Dánjal Gaardlykke**

Nei álvaratos, nú havi eg fingið nokk av hesum streykarínum. Hvat er meiningin við hesum? At knúsa alt samfelagið? Fyri mær tykist hetta sum rein terrorisma. "Um eg ikki fái mín vilja, skal hevnast. Og náði tann sum setur seg upp ímóti, ella bara torir at seta spurnartekin við fakfelagsformannin og hinar av sama kalibri.

Nú haldi eg at tað er uppá tíðina at verkafólk taka seg saman og fáa aðrar persónar at umboða seg. Nú hava vit havt vetur (Vinter) nóg leingi. Hví skal man dyrka fíggindskap ímillum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar? Tað sum ein í veruleikanum ger, er at stríðast ímóti sær sjálvum. Hví ikki læra av Sandoy Seafood? "Gongst Sandoy Seafood væl gongst tær væl"?.

Nei nú er uppá tíðina at vit í felag fara at byggja hetta landið upp, og lata vera við knúsa alt tað sum er uppbygt í berari hevnisøku og hatri. Tí hvat annað er tað enn hevnisøka og hatur sum stýrir Ingeborg og hennara líkum? Eg síggi ikki annað. Tá ið ein ongantíð hevur kunna samráðst seg til nakað sum helst uttan við verkfalli og við hóttan um morð og brand, er sera yvingasamt um ein er búgvin til sína uppgávu.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



*Kristianna og Jónsvein Jensen*

## Jónsvein Jensen 60 ár

Í dag fyllir ein kendur Gøtumaður trýss ár. Hann eitur Jónsvein Jensen. Jónsvein er sonur Martinu og Meinhard (Hellu Meinhard) Jensen í Gøtu. Hann er mitt í einum systkinaflokki upp á ellivu.

Jónsvein er best kendur sum servicemaður hjá Alu-Plast í Gøtu. Hann hevur verið í flestu húsum í Føroyum. Á flestu virkjum og stovnum, á næstan hvørjari hædd. Sett hurðar og vindeygu í ella gjørt okkurt í stand, sum er farið.

Jónsvein er giftur við Kristionnu, fødd Øregaard, úr Søldarfirði. Tey eiga dóttrina Mirjam, sum er yngst, og synirnar Tórheðin og Meinhard. Øll búgva í Gøtu. Borgar var elst, men hann fórst í bilvanlukku í 1989. Kristianna og Jónsvein eiga ommu og abbabørnini Borgar, Kristionnu, Emblu, Jan og ein nýføddan ommu og abbason.

Jónsvein fór til skips, tá hann fylti fjúrtan, og sigldi fram til 1980. Tá fór hann í land at arbeiða hjá Alu-Plast, ella hjá Schwartz, sum tað ofta varð kallað fyrr. Har hevur hann verið øll árini síðan, eisini tá tað næstan var fólkatómt kreppuárini. Hóast hann ikki hevur lært og ikki fór at arbeiða sum handverkari, fyrr enn hann var næstan fjøruti ár, so hevur hann víst seg sum ein framúr handverkara. Jónsvein sigldi fyrstu árini við Báruni í Gøtu. Seinni var hann við fleiri skipum. Hann sigldi nógv við Havørnini, og seinast í sjeytiárunum var hann við kraftblokkabátinum Polaris. Tíðliga í trýssunum var hann við týskum trolara.

Annars kann tað sigast um Jónsvein, at hann er serliga lættur í sinni, skemtingarsamur og dugir væl at práta við øll fólk. Ítróttarliga er tað GÍ, sum hevur áhugan, og í náttúruni er tað serliga fuglurin.

Jónsvein er so sera glaður fyri sang. Tað hoyrist heima í stovuni. Serliga sunnudagurin fer fyri tað nógva við sangi. Bæði at syngja við á møti í Filadelfia í Gøtu og aftur við sjónvarpi og útvarpi og fløgum heima við hús.

Stórur føðingardagur var tilrættalagdur, í leigaðum høli, men tað varð steðgað av verkfalsrørsluni. Dagurin verður hildin heima hjá Kristionnu og Jónsveini í Norðragøtu, har húsini standa opin allan dagin og alt kvøldið.

## Joan Midjord Joensen 25 ár

2. juni fylti Joan Midjord Joensen úr Klaksvík 25 ár.

Joan kenna vit best frá hondbóltinum, har hon hevur verið ein av lyklaspælarunum hjá Stjørnuni tey seinastu árini. Og somuleiðis gjørdi hon rættiliga vart við seg, tá hon varð tikin út til kvinnulandsliðið í hondbólti, sum leikti ímóti Svøríki.

Men ikki bert er Joan nú fjórðingsøld gomul. Í juli mánaði í ár hevur hon lovað jugoslaviska stjørnuspælaranum, Alexander Djordjevic sítt stóra ja. Tað fer fram í Christianskirkjuni í Klaksvík, leygardagin 12. juli klokkan 15.

Joan er dóttir Eyðun og Mildrid Joensen í Klaksvík, og hon hevur tvey systkin. Til dagligt arbeiðir hon í ítróttarhandlinum Innkast, sum hon eigur saman við systur síni.



*Joan Midjord Joensen ( til vinstru) her avmyndað saman við einari av svensku landsliðsleikarunum, Åse Eriksson*

## Jógvan Edvard 40 ár



Í gjár, 5. juni, fylti Jógvan Edvard Lindenskov Joensen í Havn 40 ár. Jógvan Edvard er sonur Rannvá og Tummas Joensen. Rannvá er úr Havn, dóttir Edvard Lindenskov (í Rættará) og Biritu, sum var ættað úr Leynum. Tummas er nólsoyingur, sonur Valborg og Jógvan í Heiðriksstovu.

Jógvan Edvard er giftur Hansinu, ið er ættað úr Garðinum í Klaksvík, dóttir, Rannvá og Kjartan Hansen.

Fyrr í ár lótu Jógvan Edvard og Hansina upp handil, ið selur køkar, Biga køkar, í Niels Finsensgøtu í Havn, har Tórs Cafteria fyrr helt til. Jógvan Edvard letur væl at undirtøkuni, handilin hevur fingið, og hann leggur dent á, at tað serliga er dygdarkøkar, hann roynir at selja.

Sum yngri var Jógvan Edvard í Danmark og læs. Hann fór seinni til skips, og sigldi - serliga við klaksvíkstrolarum – í nøkur ár. Hann hevur eisini roynt seg sum lærara og pedagog, men hevur seinnu árni verið í handli, til hann nú fór undir egnan handil.

Jógvan Edvard er eisini kendur í Gundadali, har hann kann rópa rættuliga hart, tá HB spælir – og so er tað eisini Liverpool, sum hevur hansara serliga tokka.

Jógvan Edvard eigur tvey børn, sum búgva í Danmark, Ann Celene og Janus. Um stutta tíð flyta Jógvan Edvard, Hansina og dóttirin Rannvá í nýggj hús í Maritugøtu í Hoyvík.

## Minningarorð um
# Jørgin Hansen
## Glyvrar
**f. 25.06.1938 d. 11.04.2003**



Ikki vardi tað okkum, tá ið Jørgin fór til Danmarkar í sjúkraørindum, at hetta skuldi verða hansara seinasta ferð her í lívinum. Tá ið vit, sum starvaðust saman við honum, ringdu niður til hansara, var hann so glaður og hevði gott mót. Vit hopaðu at hann skuldi vinna á sjúkuni, men so skuldi ikki verða, hansara tíð var komin.

Okkum untist at koma at kenna Jørgin gjøgnum okkara felags arbeiðspláss, á smoltstøðini, hesi seinastu árini, sum vit kunna minnast aftur á við takksemi. Jørgin stórtreivst millum okkum. Smoltstøðin liggur í haganum hjá Jørgini, so eftir loknan arbeiðsdag lá væl fyri hjá honum at hyggja eftir seyðinum, sum hann røktaði sera væl.

Jørgin var altíð góður at heita á, spurdi tú hann um onkra tænastu, var svarið, "tað er meira enn gaman í".

Jørgin hevði sera gott eyga fyri náttúruni, hann kendi hvønn fugl og hvønn seyð. Eisini hevði hann gott innlit í øllum samfelagsviðurskiftum, og av tí at hann var nakað eldri enn vit, varð tað áhugavert hjá okkum at líða á, tá hann fortaldi um ymiskt.

Í vikuskiftinum, tá Jørgin hevði frí frá arbeiði, koyrdi hann javnan niðan at hyggja til seyðin, og dámdi honum væl at koma inn á smoltstøðina at vitja vakthavandi til eitt prát og ein kaffimunn. Mangan hevði hann ein kjøtbita við, honum dámdi væl at fjálga um tey, ið vóru rundan um hann. Jørgin var sera góður við sína lítlu familju, sum nú er nógv skerd, tá hann er farin. Góða Helga, Malan, Torben, Martha og lítla Helga, tit hava mist ein góðan mann, pápa verpápa og abba. Við djúpastu samkenslu vilja vit við hesum lýsa frið yvir minnið um okkara kæra starvsfelaga og vin, Jørgin Hansen.

**Jan, Ingemar og Ragnar**

## Silvurbrúdleyp

Sunnudagin 15. juni hava hjúnini Bina Klakstein og Heri Ellingsgaard, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 14. juni, millum kl. 11:00 - 16:00, við ábiti og morgunmati (brunch) í Skálanum í Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Dagurin

**6. juni. Norbertus,** deyður í 1134. Týskur aðalsmaður, sum stovnaði eina nýggja munkaskipan í Premontre í Fraklandi og seinni gjørdist biskupur í Magdeburg.